

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 01 - 2013

# Danmark og Grønland manna samstarvsbólk

Umboð fyri grønlendska landsstýrið og donsku stjórnina samdust í dag um at manna ein arbeiðsbólk, sum skal bøta um samstarvið landanna millum á ráevnisøkinum. Tað var Grønland, sum kom við uppskotinum um arbeiðsbólkin, og á fundinum í Keypmannahavn í dag tóku Helle Thorning-Schmidt, forsætisráðharri, og hini stjórnarumboðini undir við tí. Uppskotið um at manna ein felags arbeiðsbólk kom upprunaliga frá Kuupik V. Kleist, landsstýrisformanni og jarðfrøðinginum Mimik Rosing. Helle Thorning-Schmidt segði á einum tíðindafundi í dag, at arbeiðsbólkurin skal millum annað tryggja, at danskar fyritøkur og danskur ídnaður fáa møguleikan at vísa størri áhuga fyri tí, sum hendir í Grønlandi. Kuupik V. Kleist var eisini fegin um, at hugskotið um arbeiðsbólkin hevur vunnið frama, og hann helt, at tað hevur eydnast at rudda ymisk ivamál av vegnum. Umframt vinnuarbeiðsbólkin skulu danir og grønlendingar manna eina serliga nevnd, sum skal tosa um, hvat best er at gera, tá mál í sambandi við ráevnisvinnuna, sum er grønlendskt málsøki, reisa spurningar innan trygdarpolitikk, sum er danskt ábyrgdarøki.